# Heimsmeistarar hittast

**Í samband við at fyrrverandi stórtelvarin, talvvenjarin og heimsmeistarin Mikhail Botvinnik hevði havt 90 ára føðingardag í ár, fara Garry Kasparov, Vladimir Kramnik og Anatoly Karpov at telva eina trýmanskapping í desember**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Mikhail Botvinnik úr Russlandi var ein sannur meistari. Ikki bert varð hann heimsmeistari í 1948, men eisini stovnaði hann seinni sín egna talvskúla, sum millum annað Kasparov fekk ágóðan av í 70´unum. Botvinnik lat eftir tógvið stríð heimsmeistaratittulin til Tigran Petrosian í 1963, og eftir hetta nýtti hann alla orkuna til sín talvskúla, og var hesin nógv tann kendasti av sínum slag í heiminum. Botvinnik andaðist í 1995.

Russiska talvsambandið hevur savnað størstu russisku talvnøvnini, nevnliga Kasparov, Kramnik og Karpov, at luttaka í einari serligari trýmanskapping. Hetta er kapping ognað minninum um Botvinnik. Tey trý stóru K´ini hittast fýra ferðir ímóti hvørjum øðrum, tað vil siga átta talv hvør. Onkur undrast møguliga yvir hví Karpov sleppur í part, men hann er ein livandi talvlegenda og skal als ikki undirmetast sjálvt um hann er niðanfyri topp 10 á styrkilistanum. Karpov var heimsmeistari í tíðarskeiðinum 1975-1985, Kasparov í skeiðinum 1985-2000, meðan Kramnik er núverandi heimsmeistari.

Hendan áhugaverda kapping verður telvað í desember.

## Van Wely í serklassa

Fremsti hollendski telvarin, Loek van Wely, vann sterku Lost Boys Chess Tournament. Hann endaði eitt stig ovari enn Jan Timman, Ivan Sokolov, Emil Sutovsky og Jeroen Piket. Van Wely vann heili seks talv og leikti trý jøvn. Sigast má at veteranurin Timman hongur enn væl í.

## Íslandssúlan verður komandi vikuskifti

Siðvanda Íslandssúlukappingin byrjar komandi vikuskifti í hølum Havnar Telvingarfelags. Kappingin fevnir um tvey vikuskifti, og leikt verður átta umfør. 1. umfar verður fríggjadagin. Enn er ikki vist hvar ein teknar seg, men á www.faroechess.com verða helst upplýsingar um júst hetta seinni í vikuni, eins og lýsingar verða varpaðar.

Kappingin er vanliga sterk, og eitt nú ætlar Ólavur Simonsen at royna eydnuna. Flóvin Tór Næs vann kappingina í fjør.

# Guttorm Sørensen vann Reykjavíkar hálvmarathon

*Guttorm Sørensen vann kappingina í hálvum marathon*



**Leygardagin luttóku tríggir føroyskir rennarar í hálvmarathonkapping í Reykjavík.**

RENNING
*tíðindaskriv*

Guttorm Sørensen gjørdi bart og vann kappingina hjá monnum frammanfyri ein rennara úr Kenya og ein breta. Tíðin hjá Guttormi var 1 tíma 16,16 min.

Av tí, at runnið varð á fleiri teinum samstundis, m.a. 10 km, marathon og hálvmarathon, gjørdist Guttorm ikki varugur við, at hann lá á odda, fyrr enn hann hevði runnið einar 14 km. hann rann einsamallur næstan allan vegin Nakað av mótvindi var frá fimta til fimtanda kilometurin, men annars vóru líkindini at renna góð. Rutan var sløtt fyri tað mesta.

63-ára gamli Harry Hansen av Toftum gjørdist nummar trý í aldurbólkinum fyri 60 ár og eldri aftanfyri ein amerikanara og ein breta. Tíðin hjá Harry var 1 tími 40,17 min.

Jonhard Larsen úr Klaksvík gjørdist nummar 11 í aldursbólkinum 18-39 ár við tíðini 1 tíma 29,40 min.



*Harry Hansen av Toftum gjørdist nummar trý í kappingini fyri rennarar, 60 ár og eldri*

# Kæran verður viðgjørd í kvøld




*Kappingarnevndin hjá FSF fer á fundi í kvøld at taka støðu til kæruna í dystinum millum Skála og HB, men líkamikið hvør hendan verður, kann roknast við at avgerðin verður kærd fyri dómsevndini*

**Kappingarnevndin hjá Fótbóltssambandinum fer á fundi týskvøldið at taka støðu í málinum millum Skála og HB**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Eitt at síggja til ófløkt mál, fer nú møguliga at verða avgerandi fyri, hvat lið fer at flyta upp úr 2. deild hetta kappingarárið.

Í oddadystinum fyri einari viku síðani, har Skála og HB hittust, gjørdi HB nevnliga ótilvitað nýtslu av tveimum ólógligum leikarum.

HB vann dystin 2-0, men Skála sendi alt fyri eitt kæru inn, og kravdi at fáa tey trý stigini fyri dystin. Ein kæra, sum teir uttan iva eiga viðhald í, tí HB hevði ikki loyvi at nýta leikararnar.

Trupulleikin við málinum er bara tann, at venjarin hjá HB undan dystinum hevði fingið tilsøgn um, at teir høvdu loyvi at gera nýtslu av leikarunum.

HB hevur eisini víst á hetta í svarinum til FSF, og spurningurin tykist sostatt vera, hvørja støðu FSF fer at taka í málinum í málinum.

Tann salamoniska loysnin er sjálvandi at ógylda dystin, og áseta nýggjan leikdag, men hinvegin eigur Skála sjálvandi grein í sínum máli um, at spælararnir ikki høvdu loyvi at taka lut í dystinum.

Trupulleikin í hesum er so, at HB hevur handlað í góðari trúgv, tá teir hava gjørt nýtslu av leikarunum, so umsitingarliga mistakið fær allar helst við sær, at annars parturin verður somikið firtin um avgerðina hjá kappingarnevndini, at ein avgerð í málinum – líkamikið hvør hon er – verður kært til dómsnevndina.




DAGFØR

TEG

Sosialurin

HALT

SOSIALIN

Tekna teg sum haldara, so fært tú sosialin 5 ferðir um vikuna til dyrnar

Tíðindablaðið
sosialurin
Box 76 110 Tórshavn

ÓKEYPIS
Sosialurin rindar postgjaldið

64

Undirritaði teknar seg sum haldara av Tíðindablaðnum Sosialinum, og fái blaðið *5 ferðir um vikuna.*

Navn:

Búst.:

Postnr., bygd, býur:

Tlf.:

Undirskrift:

www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo



BODY BIKE

Frá 20. august til 20. oktober

Tíðirnar verða:

| Mánadag | Týsdag | Mikudag | Hósdag | Leygardag |
| --- | --- | --- | --- | --- |
| | | | | 15.00-16.00 Weekend-burner |
| 16.30-17.30 Byrjarar | 16.30-17.30 Vand | 17.00-18.00 Fatburner | | |
| 18.00-19.00 Fatburner | 18.00-19.00 Byrjarar | | 18.30-19.30 Byrjarar | |

1 Byrjarar: Hava ikki roynt Body Bike áður
2 Fatburner: Ikki byrjarar – lægri tempo enn »Vand«
2 Vand: Ikki byrjarar – høgt tempo + nógvir spurtir
4 weekendburner: Blanda »Fatburner og Vand«

| Kostnaður fyri alt skeiðið (fastar tíðir): | | Kostnaður pr. ferð (ikki fastar tíðir): | |
| --- | --- | --- | --- |
| 1x vikuna | kr. 380,- | 1 ferð | kr. 50,- |
| 2x vikuna | kr. 620,- | 10 ferðir | kr. 400,- |
| 3x vikuna | kr. 840,- | 10 ferðir (limir) | kr. 295,- |

**Gjaldast skal við tilmelding til skeiðið í FRAGD & FIMI**

*Virkir - feløg o.l. kunnu bíleggja Body Bike-tímar fyri serprís – ring og og tosa við JANU.*

*Klænkiskeið byrjar aftur 27. aug., sí lýsing í Sosialinum fríggjadagin 24. aug. ella á okkara heimasíðu* ***fragd.olivant.fo***

Fragd & Fimi
v/ Janu Thomsen, Dj. í Geilsgøta 5
FO-100 Tórshavn, Tlf. 31 71 00
E-mail: fragd@post.olivant.fo
Heimasíða: fragd.olivant.fo

UPPLÆTINGARTÍÐIR

| | |
| --- | --- |
| Má.-Mik.-Fr. | kl. 12.00-21.00 |
| Tý.-Hó. | kl. 07.00-10.00 |
| | + 15.00-21.00 |
| Leygardag | kl.14.00-17.00 |

Sosialurin · 31 18 20

*Tað besta tú kanst bjóða tær sjálvum*



Sosialurin Sosialurin

i

Sosialurin Sosialurin